**Skúlastýrisfundur**

Dagfesting: 31.05.2017

Kl: 16:00–17:30

Til staðar: Sunrit Niklasdóttir, Nelly Debes Christiansen, Marjun Danielsen, Ragnar Isaksen, Vivi Davidsen, Súsanna Mortensen og Høgni Warberg

Skrivari: Høgni Warberg

Skrá:

1: Góðkenna fundarfrásøgn

2: Garðdagurin 21. juni

3: Frágreiðing frá aðalfundi hjá Heim og skúli 22. apríl, sum Ragnar og Vivi vóru til

4: Hvussu kunnu vit "pifta" heimasíðuna hjá skúlanum meira upp og gera hana meira livandi, aktiva og kunnandi.

5: Seta skjøtil á projektætlan fyri fimleikarhøllina - seta arbeiðsbólk at arbeiða víðari við hesum - og leggja eina tíðarætlan.

6: Á temadegnum í Havn 21. januar, tosaði Rigmor um, at tey hava tvífaldað játtanina til royndarverkætlanir á skúlunum. Hevði tað verið eitt hugskot at fingið umboð frá MMR til Kvívíkar, tann dagin vit møtast við lærarunum í septembur at kunna um, hvørjir møguleikar liggja í hesum?

7: Uppskot til komandi kvøldskúlaár.

8: Ymiskt

Att 1: Fundarfrásøgnin frá seinasta skúlastýrisfundi var góðkend og verður í næstum løgd út á heimasíðuna.

Att 2: Garðdagur verður mikudagin 21. juni frá klokkan 14:30-18:00. Ragnar fær til vega eina grill, og Ragnar kemur at standa fyri at grilla. Vivi og Marjun koma við eini STÓRARI skuffukaku hvør (ella tveimum smærri skuffukakum). Nelly og Sunrit standa fyri at skera fruktirnar. Starvsfólk skúlans standa fyri kaffi, the og bestik, umframt saman við spæliliðnum at skipa fyri spølunum. Dagurin byrjar við kaffi, køkum og frukt kl. 14:30. Spølini byrja kl. 15:00 og grilla verður áleið kl. 17. Høgni keypir inn pylsur, breyð, ketchup, sinnop, leyk, saft og frukt.

Att 3: Sera fá fólk vóru møtt til aðalfundin hjá Heim og skúla 22. apríl. Sambært Ragnar og Vivi vóru tað kanska ikki meir enn eini 25 fólk tilsamans til fundin. Nýggj nevnd var vald á aðalfundinum. Regin Marnerson, stjóri á Námi hevði víst á, at úrslitini frá Landsroyndunum, als ikki verða brúkt til nakað, sum veruliga ger mun.

Att: 4: Marjun segði seg vera av tí fatan, at tað onkuntíð tók alt ov langa tíð at koma inn á heimasíðuna hjá skúlanum. Hon helt, at teir lagdu frídagarnir áttu at verið meira sjónligir á heimasíðuni. Høgni vísti á, at hesir frídagarnir eru at finna í faldara skúlans, sum liggur á heimasíðu skúlans, og sum øll foreldrini fáa í pappírsformi við skúlaársbyrjan. Marjun helt, at hesir frídagar áttu at verið betri markeraðir í faldaranum. Hetta fer Høgni at hava í huga, tá faldarin til komandi skúlaár skal gerast. Marjun helt eisini, at nakrar av myndunum á heimasíðuni vóru ov gamlar, og at børn, sum ikki longur ganga í skúlanum, eru á onkrum av myndunum. Marjun vísti á, at seinastu tíðuna varð ov lítið nýtt komið út á forsíðuna á heimasíðuna. Hetta kundi Høgni taka undir við, og kemst hetta partvíst av, at foreldur og næmingar fáa mestu kunning vm. umvegis vikuætlanirnar og onkuntíð via teldupost.

Att 5: Tosað varð um at seta arbeiðsbólk at seta skjøtil á verkætlan fyri fimleikarhøllina. Í arbeiðsbólkinum verða Sunrit Niklasdóttir, Ragnar Isaksen og Turið á Tórgarði. Sunrit fer í næstum at kalla Ragnar og Turið inn til fund

Att 6: Høgni fer at seta seg í samband við MMR við tí fyri eyga, at fáa onkran teirra at greiða frá, hvørjir møguleikar liggja í royndarverkætlanum. Ætlanin er so, at umboð frá MMR koma at greiða frá fyri lærarum og skúlastýrinum kl. 14:30, og at so skúlastýrið og lærararnir hava restina av tíðini saman, har tosað verður um ynskir, vónir vm. Høgni fer at bíleggja umleið 45

smyrjibreyð frá Eydnu í Skælingi til henda dagin. **Varð tað onkur, ið skuldi baka kaku til henda dagin??**

Att 7: Nelly hevur eina rúgvu av hugskotum til skeið fyri børnum og ungum at hava í Kvøldskúlanum. Ætlanin er m.a. at kunna brúka gamla pakkhús til ymiskt skitið arbeiði og skúlan til m.a. tann ástøðiliga partin. Vegna Kvøldskúlan hevur Høgni spurt kommununa, um tey kunnu seta í stand gamla pakkhús, soleiðis at tað m.a. kann nýtast til ymsar lærugreinir í Kvøldskúlanum. Tað snýr seg m.a. um at fáa til vega heitt vatn, góða frárenning/frárensl. Miðað verður ímóti at royna okkurt av skeiðs-hugskotunum hjá Nelly í Kvøldskúlanum til komandi vetur.

Att 8:
Mikudagin 6. september kl. 16:00-17:30 verður vanligur skúlastýrisfundur.
Mikudagin 4. oktober kl.14:30 til 16:30 verður skúlastýrisfundur, har lærararnir eru við. Tá er sum sagt eisini ætlanin at fáa vitjan av MMR.
Mikukvøldið 27. september kl. 17:15 verður fundur við skúlastýrið í Vestmanna skúla. Fundurin verður staðsettur í Vestmanna skúla.
Mikukvøldið 15. november verður felagsforeldrafundurin, sum skúlastýrið skipar fyri.
Høgni kunnaði um, at til komandi skúlaár, er Turið á Tórgarði sett í fast fulltíðarstarv og Turið Gaard Hansen í tíðaravmarkað hálvtíðarstarv.